nøvn nú

Heilsanir

Gó›i Leivur
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 70 ára degnum. Stuttligt at tit øll eru heima nú, gle›a okkum til leygarkvøldi›!
Johannes, Hildibjørg og dreingirnir

Gó›u Vár og Barba
Hjartaliga tillukku vi› 5 ára døgunum.
Ynskja mamma, babba og Regin

Gó›a elska›a Heidi
Hjartaliga tillukku vi› 3 ára fø›ingardegnum í gjár. Jesuspápi styrki teg, alt ta› besta.
Ynskja mamma og babba

Gó›a Erla
Hjartaliga tillukku vi› 18 ára degnum.
Ynskir abbi tín

Gó›a omma/mamma-/vermamma
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 80 ára degnum og takk fyri alt tú ert fyri okkum
Vit í Brobbersgøtu 14

Gó›u Vár og Barba
Hjartaliga tillukku vi› 5 ára døgunum 11. juli. Muss og klemm.
Valdis omma



Hjartaliga tillukku vi› tí runda degnum í dag, frá øllum í húsinum.
Núverandi myndaeigari

Gó›i babba
Hjartaliga tillukku vi› 25 ára degnum.
Ynskja eg og mamma



Ja solei›is sær man út eftir ein langan arbei›sdag hjá Saab. Tillukku vi› teimum 30 Jon Martin.
Heilsan vit á Saab
PS. Tú mást skunda tær

Gó›a dóttir, systir og mostir
Hjartaliga tillukku vi› degnum, takk fyri alt tú ert fyri okkum.
Bjarta

Gó›a Hanna!
Tillukku vi› 13 ára degnum.
Heilsan mamma, babba og Pætur

Gó›a Súsanna
Hetta er ein seinka› fø›ingardagsheilsan. Eisini ynskja vit tær og Neistanum tillukku vi› úrslitunum í Svøríki.
Heilsan fastir, Christian, Svenning og Bent

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ....
....
....
....
....
....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«

nøvn nú



Til Joh. M. Olsen, Velbasta›veg, Tórshavn
Hjartaliga tillukku vi› 80 ára degnum. Her gevur hann børnunum sodavatn. Men Hanne hevur givi› teimum Guds or› í fleiri ár. Harrans signing.
Ynskja »Gamlir arbei›sfelagar«

Gó›a Hanna-gumma
Tillukku vi› 13 ára degnum.
Heilsan Ey›, Ragnar, Joan, gumma og Ingi

Gó›a Sólbjørg
Hjartaliga tillukku á 3 ára fø›ingardegnum.
Ynskja omma og abbi í Eiriksgøtu



Gó›i abbi-lang
Hjartaliga tillukku vi› 80 ára fø›ingardegnum í dag, og nógv gó› ár í framtí›ini.
Ynskja Andrias og Bogi



Gó›a fitta lítlasystur
Hjartaliga tillukku vi› 3 ára fø›ingardegnum í gjár. Alt ta› besta ynskja vit tær. Jesuspápi signi teg.
Heilsan Angela og Sólvá



Gó›a fitta Hildur
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 3 ára fø›ingardegnum 8. juli. Nú ert tú ein stór genta.
Ynskja Lillian og Sverri



Gó›i Hakim Tóri!
Hjartaliga tillukku vi› 5 ára degnum, i› var 9. juli og alt ta› besta í framtí›ini.
Ynskir mamma

Vi›merking:

Eitt ótakksamt fólk, tjó›

Vit hava ómetaliga nógv at takka okkara skapara fyri her á Føroyalandi.

Ta› hevur veri› sagt fyrr, og skal eg royna at endurtaka ta› betri hesafer›.

Eg havi tosa› vi› nógvar landsmenn, føroyingar. Og – hava vit veri› hjartaliga samdir, at her er ómetaliga nógv, i› vit áttu at veri takksamir fyri.

Eg plagdi at siga, at um naka› paradis er á jør›, er ta› Føroyar.

Ein n‡tist ikki at fara í hvønn einkultan lut, i› hvat onnur mugu lí›a undir, og sum vit eru spard fyri. So sum kríggj, hungursney›, dey›iligar umfarssóttir, fátækradømi, náttúruvanlukkur, kriminalitetur, skøkjulevna, fríur porno og narkotika, bæ›i framlei›sla, søla og misbrúk o.s.fr.

Her á føroyalandi er eingin svangur, nakin, kaldur ella uttan tak yvir høvdi›.

Og – ta› kundi veri› nógvar fer›ir betri, um vit vóru meiri miskunnsom móti teim veiku í samfelagnum. Um ikki havisjúka og korruptión og anna› gu›loysi ráddi í Føroyum.

Ta› er so ríkiligt til øll, um vit bert bert vitstu hvat nøgdsemi er, og ikki minst at óttast Gu› og takka honum fyri øll vælsignilsini. Tann stóri meirilutin í Føroyum skálar, ótamt, upp um, at tey hava krav uppá dit og dat.

Spyr tú biddaran ella gøtubarni›, sum royna at verma seg undir eini pappeskju í slumgøtunum í Calcutta, hvat krav tey hava at fáa bert eina brey›skorpu frá tær? Ella heldur tú teg vera meir verdan enn biddaran og gøtubarni›? Í Guds eygum ert tú ta› ikki.

Lat meg taka einans eitt dømi, sum er himmalrópandi. Í dag er ta› eitt sjálvsagt krav í Føroyum, at tá tey ungu fylla átjan ár, skal bilurin standa klárur í túninum. Var ikki meir rímiligt at takka fyri skaparverki›, sum eitur føtur og bein at flyta seg fram vi›?

Fyrr vór›u børn lærd »at seta føtur undir egi bor›«. Nú ver›a tey lærd at krevja frá tí almenna. T. d. sum ítróttarfólk til tey eru 35-40 ára gomul.

Skaparin hevur givi› okkum ein heila. So brúka hann eina løtu, at tonkja uppá, hvussu óforskamma kravmikil vit eru.

Ta› stendur frítt fyri ein og hvønn, sum heldur, at ta› er ikki liviligt í Føroyum at flyta av landinum. Men – lat okkum, sum eftir eru, taka vi› tøkk móti hesum frælsi, sum Harrin hevur ætla okkum.

Vit vita væl, at vit kunnu ikki klára okkum sjálvi. Ta› veit Gu› eisini. Tí hevur Harrin eisini sagt, at vit skulu líta á hann. Hann hevur tilskila›, at vit skulu ikki líta á menniskju. Og – tá vit eru ólí›in móti honum, spotta vit hann og hansara gávur.

Ta› er tann størsta armó› og gu›loysi, at halda, at Danmark skal tryggja okkum framtí›ina. Ta› er – ta› haldi eg meg vera vísan í – at ta› er einki minni enn synd, stór synd at snúlta uppá danir.

Jákup Vang

Ríkisfelagsskapurin - at líkna vi› eitt ljó›føri:

Ríkisfelagsskapurin er at líkna vi› eitt ljó›føri. Tangentarnir ella streingirnir eru har. Um virtuosurin leikar, fylla vakrastu tónar rúmi›. Solei›is er vi› Ríkisfelagsskapinum. Synd er at siga, at núverandi samgonga spælir væl uppá streingirnar hon hevur fingi› at umsita í 4 ár. Onkur disharmoniur fyllir rúmi› nú og tá. Og at spæla saman vi› ø›rum er hon púra ei›asør til. Íme›an Nyrup og Motzfeldt vegna ríkisfelagsskapin samrá›ast vi› Romano Prodi frá EU um betri umstø›ur fyri Grønland, eru Kallsberg og Hoydal fornerma›ir.

Teir spæla sera vánaliga vi› einum fingri.

Men tólinum, Ríkisfelagsskapinum, bilar onki. Tí a›rir í sama felagsskapi fáa vakrastu tónar at ljóma, so ta› er ein sonn frøi at lurta.

Vinarliga Marjus Dam, løgtingsma›ur

Lesið Sosialin

Samskipari av útbering

Søkt verður eftir fólki at standa fyri útberingini av Dimmalætting og Sosialinum umframt lýsingarbløðum at byrja skjótast møguligt.

Uppgávur:
- samskipan av rutuneti
- ábyrgd av og samskifti við blaðútberarar
- kundaavgreiðsla

umframt annað, sum náttúrligt hoyrir við til starvið.

Førleikakrøv:
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og strukturerað og hevur góð evnir at samskifta við fólk. Tann, ið settur verður, skal kunna arbeiða skiftandi arbeiðstíðir. Royndir sum samskipari er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aage Nybo á tlf. 214118. Løn sambært avtalu. Umsóknir, mrk. samskipari, skulu verða Prentmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mikudagin 12. juli 2000.

P/F Prentsmiðstøðin
Smyrilsvegur 13
100 Tórshavn

Prentsmiðstøðin er eitt nýstovnað partafelag, ið P/F Dimmalætting og Sosialurin (Sp/f Húsið) hava sett á stovn. Endamál felagsins er blaðprent og blaðútbering. Uml. 200 útberarar eru tilknýttir felagnum. Fyribils verður bert borið út fríggjakvøld.